

[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 11 - 05 - 2013

# Íløguhugurin minkar við hægri olju-skatti

Nógv kjak hevur staðist av, at norska stjórnin hevur hækkað skattin hjá oljuvinnuni. Fleiri greinarar og fólk innan vinnuna halda, at hetta kann hava við sær minni íløgur í framtíðini. Tað globala virksemið innan oljuvinnuna er broytt seinnu árini hjá nøkrum av norsku oljufeløgunum. Hetta ger, at feløgini skulu gera stórar íløgur í útbyggingar av hesum oljufeltunum. Hetta setir stór krøv til neyvar raðfestingar av íløgunum hjá feløgunum. Við einum hægri skatti í Norra, koma norskar íløgur at verða verri fyri, og feløgini koma at brúka peningin meira uttan fyri Norra. Sjálvt um skatturin á oljuvinnuna kann sýnast høgur í Norra, so stuðlar stjórnin nógv leitivirksemi og útbyggingar, so samlað hevur oljuvinnan góðar treytir í Norra. Tað er bert fyri offshore vinnuna, at skatturin hækkar eitt sindur. Fyri allar hinar vinnurnar á landi verður skatturin lækkaður. Eisini í Bretlandi hevur hesin spurningurin verið nógv frammi, síðani stjórnin hækkaði skattin hjá oljufeløgunum í 2011 men broytti avgerðina árið eftir.